Sørvágs Kommuna
FO-380 Sørvágur

Kunningarskriv 2004

Góðu Sørvingar

Vit eru farin um stytsta dag." Á vetri er hon fjald, og hevur lítið vald, á sumri er hon sterk og fjálgar um Guds skaparverk." Soleiðis verður yrkt, javnt og samt togar sólin seg upp ígjøgnum fjallalíðirnar. Àrið 2004 er komið at enda, eitt tíðarskeið í lívinum er eisini at enda komið. Eg fari í stuttum at greiða borgarunum frá farna og seinasta árinum í hesum valskeiði.

Fíggjarætlanin
Bygdarráðið hevur havt 15 fundir í hesum árinum, og umleið 140 mál eru viðgjørd. Fíggjarætlanin fyri 2005 var til triðju viðgerð og endaliga samtykt á fundi 30.11.04. Skattskylduga inntøkan verður mett til 133.440.700 kr. Eftir vøkstur í inntøku seinastu árini, verður nú roknað við, at inntøkan í 2005 verður á leið tann sama sum í 2004. Tað, at inntøkan ikki økist, kemst uttan iva av teim versnaðu fiskaprísum og vánaligu útlitunum í alivinnuni.
Skattaprosentið verður óbroytt 19,75 og barnafrádrátturin 3.000 kr. Hóast kurvan flatar út, er inntøkan góð. Persónsskatturin higartil í ár er eitt lítið vet hægri, enn síðsta ár, men aðrar inntøkur er nakað minni.

Roknskapurin
Grannskoðaði roknskapurin fyri 2003 varð endaliga góðkendur á fundi 12.05.04. Ársroknskapurin vísir eina javnvág upp á 28.048.514 kr. Rakstrarútreiðslurnar vóru 14,9 mió. kr., og gjørdar vóru íløgur fyri samanlagt 6,2 mió. kr.
Í fíggjarætlanini fyri 2003 varð roknað við halli, og vísir roknskapurin, at úrslitið var eitt hall upp á 2,1 mió. kr. eftir avdráttir. Skuldin er nú komin niður á 2,5 mill., og nakrar krónur eru á kistu-botninum, soleiðis at nettoáognin við árslok 2004 verður mett til uml. 6,9 mió. kr. Orðatakið sigur,at tá armóðin er komin á føturnar, kemur hon skjótt á allan kroppin. Hesa støðu var bygd okkara á gáttini til at koma í fyri nøkrum árum síðani. Takkað verið fólki og vinnulívi saman við bygdarráðum, so megnaðu vit at broyta hesa gongd, so bygdin í dag telist ímillum tær kommunur, ið mettar verða at vera væl fyri.

Fólkatalið
Fólkatalið í bygdini broytist ikki tað stóra. Við árslok 2003 búðu 976 fólk í kommununi, men eftir 01. januar 2005 verður fólkatalið í tí samanlødgu kommununi, sum tá umfatar bygdirnar Bø, Gásadal, Mykines og Sørvág uml. 1084 fólk.

Teknisk mál
Tey Teknisk málini rúgva mest í kommunalum samanhangi. Hetta sæst aftur í teimum vaksandi íløgum seinastu árini. Sitandi bygdarráð setti sær fyri at fáa teir kommunalu vegirnar betraðar. Hettar arbeiði er komið væl áleiðis, men nakað er eftir enn.

Sum flest øllum kunnugt, er byggingin upp á barnagarðin byrjað. Jørð- og betongarbeiði, sum er tann fyrsti parturin, skal eftir ætlan verða liðugur 20. januar 2005. Útboðstilfar til timburarbeiði skal verða klárt 15. januar. Um hetta arbeiði verður boðið út alment, ella í innbodnari kapping, kemur komandi bygdarráð at taka sær av.
Hetta er ein stór og spennandi uppgáva, sum bygdarfólkið, serliga tær ungu barnafamiljurnar, koma at gleðast um. Hetta verður ein vakur bygningur, sum vónandi kemur at taka seg væl út í umhvørvinum.

Grundstykkjatørvur hevur verið ein afturvendandi trupulleiki í bygdini. Gongdin í hesum málum, sum vit kenna tey, er, at kommunan ger eina ætlan, og ber kostnaðin av allari vegagerð, meðan sølan er á privatum hondum. Hesa gongd hevur kommunan ætlanir um at broyta. Framyvir kemur kommunan at standa fyri útstykkingum, og sum eina byrjan til hetta, hevur kommunan keypt partar av Heygagerði, har pláss verður fyri eini 12-15 húsum.

Felagið Prýði
Í vár varð felag stovnað, sum hevur til endamáls á fríðka bygdina. Felagið ber navnið Sørvágs Prýði.
Stigtakari til felagið var Karl Martin Várlíð Hini í nevndini eru Kirstin Jensen, Høgni Nielsen, Edna Niclasen, Arngerð Davidsen og tiltakslimir eru Marita Fredriksen og Maria Mouritsen.

Endamálið hjá felagnum er at prýða um bygd okkara, at stimbra áhugan hjá borgarunum at varðveita ávísar bygningar, og at verja teir og umhvørvið ímóti misprýði. Eisini er endamálið at skapa betri fatan av tí at hava eitt vakurt umhvørvi í kommununi.
Felagið fór til verka í vár, og kunnu longu nú síggjast økir, sum eru plantað, og sum er eitt prýði fyri bygdina. Hugskotið til jólamannin á reynsdjórunum niðri við fótbóltsvøllin, sum hevur verið rættuliga veðurbardur í jólamánaðanum, kom eisini frá limum í felagnum Prýðnum.

Um áhugi er at gerast limur í felagnum, er møguleiki at venda sær til ein av nevndarlimunum.

Gøtunøvn
Ì summar komu nøvn á gøturnar í bygdini. Fólk fingu sendandi í brævbjálva eitt skriv saman við húsanummari og hvussu navnið á bústaðnum kallast. Heit verður á øll húski um at fáa nummarið upp. Um áhugi er fyri at fáa eitt yvirlit yvir nøvn og nummar í bygdini, eru tygum vælkomin at seta tygum samband við kommununa. Hettar kann fáast ókeypis.

Byggisamtyktin
Sum nevnt í seinasta skrivi er byggisamtyktin endaliga samtykt, og góðkend av landsmyndugleikunum.
Fyrr í ár fingu borgararnir eitt eintak av byggisamtyktini sendandi. Hetta verður gjørt fyri at kunna um hvørjir møguleikar eru í einhvørjari bygging í kommununi. Ein byggisamtykt/ætlan er eitt arbeiðsamboð hjá einhvørjari kommunu, og eigur ikki at verða gingið frá hesum uttan víðari. Verður ikki hildið fast um hettar, er skjótt at einki tamarhald verður á nakrari bygging.

Hvørjar ætlanir eru í komandi ári, eri eg ikki tann rætti at geva eitt boð uppá, men kann frá fíggjarætlanini fyri 2005 nevna nøkur øki sum peningur er avsettur til.

Sum nevnt hevur barnagarðurin tað størstu játtanina. Vatnið, sum ikki endaliga er komið upp á pláss, hevur eisini fingið eina høga raðfesting. Aðrar íløgur, so sum byrjan upp á egningaskúrar, ídnaðarøki, smærri vegagerðir, útstykking og framhaldandi liðugtgerð av veganetinum, eru við á fíggjarætlanini. Eisini er peningur settur av til eitt skitsuprojekt av einum eldrasambýli. À hesum økið mugu vit í Vágum ásanna, at fyri gott 30 árum síðan, tá Ellis og røktarheimið varð, bygt slóðaðu vit fyri á hesum økinum, men mugu í dag ásanna, at vit eru við at gerast eftirbátu. Ì flestu størru bygdunum/kommununum eru sambýlismøguleikar komnir tey seinastu árini, og fleiri eru ávegis.

Havnarøkið
Havnarøkið hevur tey seinastu árini staðið fyri stórari menning, men ikki allar vinnugreinar hava havt vind í seglunum. Alivinnan, sum bert fyri einum ári hevði eini 20-25 fólk í arbeiði, hevur niðurlagt alt sítt virksemið. Vánaligur prísur, saman við sjúkum, hevur niðurlagt so gott sum alla aling í landinum. Um nøkur aling verður aftur á fjørðinum, ber ikki til at siga í skrivandi løtu.

Fiskiflotin hevur havt eitt misjavnt ár. Størsti partur av heimaflotin hevur eitt verri ár enn í fjør. Orsøkirnar eru versnandi upsaprísur saman við hægri oljuprísum. Hvat komandi ár hevur at bjóða, er okkum ókent, men vit seta vónina til at tíðurnar broytast til tað betra. Heldur ikki útróðurin hevur givið somu úrtøku sum seinasta ár. Minni nøgd og vánalig líkindi í heyst, er ein av orsøkunum. Men onkur sólskinssøga er kortini. Tungvektarin í føroyskari fiskivinnu, Vesturvón, hevur havt eitt av sínum bestu árum nakrantíð. Hetta er at fegnast um, nú búskaparstøðan í samfelagnum er fallandi.

Aðrar positivar hendingar innan fiskivinnu eru eisini hendar í árinum sum fer. Ì summar læt snotiliga landingarmiðstøðin sum Vinjard Joensen sáli legði lunnar undir, upp fyri móttøku. Landingarmiðstøðin virkar væl, og eru umleið 5000 tons komin upp á land í ár.

Annars eru tær somu tænastur innan handverk og handil á havnaøkinum. Sum nevnt í seinasta kunningarskrivi skulu allar havnir, sum taka ímóti skipum omanfyri 500 tons hava eina IMO góðkenning. Her kann upplýsast, at Sørvágs havnar er góðkend.

Vága Floghavn
Vága floghavn var umrødd í seinasta kunningarskrivi. Nevnt var, at arbeitt var við einari útbyggingarætlan, sum skuldi umfata:

Krøv um økta trygd
Ynski frá ferðandi, um betri tænastu.
Útlit fyri framtíðarflúgving
Vaksandi tørvur fyri leinging
Ein møgulig oljuvinna.

Staðfestast kann, at ikki nógv er hent á hesum øki, hóast ferðafólkatalið aftur setur met við einum vøkstri uppá 2,1% í mun til seinasta ár.

Sigast skal tó, at tað sum skiftandi landsstýri ikki hava megnað, er her kanska ein glotti at hóma. Ein ætlan um útbygging, fyri síðani at yvirtaka vøllin, er møguliga í ljósmála. Um hettar verður egg ella ungi, fæst at vita fyrst í komandi ár.

Tann 30 oktober fleyg Maersk eftir 30 árum sín seinasta túr ímillum Keypmannahavn og Vágar. Eitt tíðarskeið í føroyskari flogsøgu var komið at enda, men fyrr í ár kundu vit fegnast um, at flotin hjá føroyska flogfelagnum bleiv øktur við einum flogfari afturat av slagnum, sum felagið hevur frammanundan.

Kommunusamanlegging
Tann 20. mars 2004 var fólkaatkvøða í Bíggjar kommunu um kommunusamanlegging. Ein meiriluti uppá 63% var fyri samanlegging, og staðfestast kundi, at frá 01. januar 2005 verður Sørvágs kommuna ein størri kommuna. Tá verða bygdirnar Bøur – Gásadal lagdar saman við Sørvágs kommunu. Hvat fólkatali viðvíkur, verður kommunan sløk 100 fólk fleiri, men í vídd umfatar kommunan uml. helvtina av Vágoynni.

Tann 1.juli 2004 undirskrivaðu Sørvágs og Bíggjar- kommunur sáttmálan um samanlegging. Sáttmálin var undirskrivaður á samkomu í Tindhólmi.
Nakrar dagar seinni kom umsókn frá Mykinesar kommunu um samanlegging. Samráðingar vóru tiknar upp beinanvegin. Arbeiðast skuldi skjótt, tá tíðin gekk undan. Tann 3.september skuldi sáttmálin undirskrivast í Mykinesi, men veðrið gjørdist so vánaligt, at vandi var fyri, at bygdaráðslimir ikki sluppu innaftur. Tá seinri túrur við tyrluni kundi verða, avlýstur, var avgjørt, at bygdaráðslimir í Mykinesi undirskrivað sáttmálan í Mykinesi. Hesin varð síðan síðani flogin inn til Sørvágs til undirskrivingar.
Sostatt fevnir Sørvágs kommuna eftir 1. januar 2005 um bygdirnar Sørvágur, Bøur, Gásadalur og Mykines.

Kommunustýrisvali 2004
Týsdagin 9. november 2004 skuldu vit aftur til valborðið. Veljast skuldu 7 umboð til at stýra kommununi. Hettar var eitt søguligt val, tí veljast skuldi bygdaráðslimir at umboða ta samanløgdu kommununa. 27 fólk bjóðaðu seg fram og úrslitið gjørdist:

Thordis Skaalum 63 atkvøður, Jógvan P Joensen 100 atkvøður Eiley Weihe 57 atkvøður, Jákup S Lauritsen 57 atkvøður, Erik Davidsen 51 atkvøður, Sune Jacobsen 49 atkvøður, og Jóhan á Ørg 39 atkvøður.

Á bygdarráðsfundi 16. november 2004 var Jákup Suni Lauritsen valdur til formann, og Erik Davidsen til næstformann. Nevndirnar eru:

Fíggjarnevnd: Jákup S Lauritsen, Erik Davidsen.Jógvan P Joensen.
Tekniska nevnd: Erik Davidsen, Sune Jacobsen, Thordis Skaalum
Trivnaðarnevnd: Thordis Skaalum, Eiley Weihe, Jóhan á Ørg
Havnanevnd: Jóhan á Ørg, Sune Jacobsen, Eiley Weihe
Mykisnevndin: Jákup S Lauritsen, Jógvan P Joensen, Eddie Lauritsen, Esbern í Eyðanstovu og Jákup Jacobsen.

Framtíðarútlit
Vit kunnu læra av fortíðini, men tað er ringt at spáa um framtíðina. Orðatakið sigur, at tað eru spjaddir tankar í fløktum høvdi, og soleiðis er í skrivandi løtu. Vitandi um, at samfelag okkara stendur fyri fíggjarligum broytingum, so kunnu hesar ikki sammetast við tíðina fyri 10-12 árum síðan. Skuldi hugleitt verðið um hesa tíð, kundi heftið skjótt verið dupult so tjúkt.

Samfelagsbúskapur okkara hevur altíð verið svingandi. Okkara tilvera hevur upp ígjøgnum tíðina verið bygd á tað, sum úr havinum kemur. Hóast aðrir inntøkumøguleikar er troyttir so mugu vit ásanna at heldur ikki her hevur gingið eftir vild. Fiskivinnan á sjógvi og á landi, alivinnan, hesi vinnuøki, sum kastaðu pening av sær fyri fáum árum síðan, hava reyðar linjur á botnlinjuni, og tað, sum verri er; sláðin er farin fyri hurðina hjá fleiri av teimum.

Men vit eiga ikki at falla í fátt, men læra at liva við teim fortreytum, sum til ein og hvørja tíð ger seg galdandi. Framtíðina kunnu vit bert sjálvi evna, møguleikarnir eru nógvir, vit skulu bert fáa eyga á teir.

Persónliga valdi eg ikki at stilla uppaftur til bygdaráðsvali 2004. 12 ár í kommunalpolitikki, har eg tey seinastu 4 árini havi sitið við borðendan sum formaður, hava lært meg nógv, og havi eg verið glaður fyri hetta tíðarskeið.
Lokalsamfelagið er til tíðir strævið, og kemur rættuliga tætt uppá. Okkurt er sagt og gjørt, sum heldur skuldi verið øgjørt, men soleiðis eru viðurskiftini nú einaferð. Vit tráða øll til tíðir eftir at sleppa at siga sannleikan, men oftani er hann meira niðurbrótandi enn uppbyggandi.

Til tykkum sum nú skulu ráða fyri borgum, farið eg at ynskja góða eydnu. Politikkur er at hava visjónir og finna loysnir. Møguleikarnir fyri at henda kommuna verður eitt enn betri stað at búgvi í, eru til staðar, og liggur í tykkara hondum, men gerst hetta berst um áralag er.

Eg fari til seinast vegna bygdarráðið at takka tykkum øllum, starvsfólkum í kommununi, og borgarum annars, og ynskja eitt av Harranum vælsignað nýggjár við tøkk fyri tað farna. Enn einaferð til tykkum, sum á hvørjum ári brúka tíð og orku til at hugna um bygd okkara við ymiskum tiltøkum, hjartans tøkk. Gott nýggjár øll somul.

Sørvágur, 30.desember 2004

Vinarliga

Sørvágs Kommuna

Eivin H Jacobsen, borgarstjóri